25-03-2025

SUÐUROYARTUNNIL

-avlopsgrót

Fróði Mortensen
TVØROYRAR KOMMUNA

Málslýsing og Verkætlanar-viðmerkingar viðv. avlopsgróti í Suðuroynni

Málslýsing:
Samsvarandi uppskot til Løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum er ein spurningur, sum greiða má fáast á, hvat skal henda við avlopsgrótinum.

Verkætlanar-viðmerkingar viðv. avlopsgróti í Suðuroynni (2.4 Grót)
Við hvønn endan av Suðuroyartunlinum verður runt roknað uml. 1 millión m3 av avlopsgróti, umframt grót frá Sandvíkartunlinum og einum møguligum tunli í Sandalíð.

Ein stór grótnøgd er ein umhvørvisavbjóðing til greitt er, hvat grótið skal nýtast til. Avbjóðingin við avlopsgrótinum er í sambandi við ein Suðuroyartunnil størri enn í undanfarnum verkætlanum, tí mongdirnar av gróti eru munandi størri í sama stað sammett við undanfarnar tunnilsverkætlanir.

Tá ið sprongt verður fyri undirsjóvartunlum, verða stórar nøgdir av spreingievni nýttar. Hetta merkir, at avlopsgrótið í høvuðsheitum er smágrót, umframt at styrkin á grótinum ofta er lítil, orsakað av hørðu spreingingunum og ymisku flágunum arbeitt verður ígjøgnum. Slagið, góðskan og støddin á avlopsgrótinum avmarka tí, hvat grótið kann nýtast til.

Avlopsgrót úr tunnilsverkætlanum hevur áður verið nýtt sum fylligrót í vegir, og til dømis til havnabygging, víðkan av havnaløgum og líknandi.

Talan er um eitt tilfeingi, sum eigur at verða gagnnýtt til neyðugar uppfyllingar í landinum, so tað slepst undan at spreingja grótbrot eftir fyllugróti.

Nakað av grótinum kann nýtast til tilhoyrandi vegagerð og møguligar ljóðdoyvandi vollar framvið vegum. Onnur boð uppá verkætlanir, sum hava verið nevndar, eru til dømis at gera eina oyggj ella hálvoyggj norðanfyri Sandvík ella nærhendis Skarvanes ella at útbyggja Gomlurætt.

Nýggju økini kundu síðani til dømis nýtast til vindmyllulundir, grøna orku ella til vinnuøki.

Royndirnar hjá Eystur- og Sandoyartunlinum P/F at finna avtakarar til grótið hava verið misjavnar. Tí hevur P/F Suðuroyartunnilin mælt til, at grótið verður lagt so tætt við tunnilsmunnarnar, sum gjørligt.

Hetta kann gerast sum ein meira varandi loysn, har grótið verður planerað út, lendið verður tillagað og mold løgd omaná, annaðhvørt til haga ella til bø.

Til ber eisini at gera eina loysn, har talan kann vera um eina fyribils loysn í eitt nærri ásett áramál, har grótið kann vera gagnnýtt til verkætlanir, sum hava tørv á gróti, fyri síðani at vera planerað og klætt við mold, tá áramálið er liðugt.

Tunnilsverkætlanin tekur 8-10 ár. Hetta krevur, at grótið verður lagt í hægri rúgvur, og vil sostatt taka minni pláss og ávirka náttúruna minni samlað sæð. Sí annars fylgiskjøl 14 og 15 við uppskotum um staðseting av gróti í Djúpadali og í Sandvík.

Økt ferðsla í økinum fer óivað at hava við sær óljóð og luftdálking. Tó kann væntast, at størsti parturin av føroysku akførunum ikki brenna bensin og diesel, tá bygging av Suðuroyartunlinum er liðug, og tunnilin er tikin í nýtslu. Harvið verður útlátið av vakstrarhúsgassum avmarkað.

Harafturat verður helst talan um eina munandi minking í útláti av vakstarhúsgassum, tá verandi sjóvegis farleið kann verða niðurløgd, um undirsjóvartunnilin verður veruleiki. Sum sagt, verður neyðugt at taka hond um umhvørvisárin tíðliga í tilgongdini og at fáa til vega neyðug loyvi frá avvarðandi myndugleikum. Í sambandi við at verkætlanin verður fyrireikað og prosjekterað, verður eisini gjørd umhvørvisárinskanning, og verkætlanin skal eisini hava neyðuga góðkenning frá Umhvørvisstovuni.

Tilmælið hjá Teknisku deild og kommunustjóranum:
Eftir áheitan frá borgarstjóranum í Tvøroyrar kommunu, Kristin Michelsen, *-eftir at allir borgarstjórarnir í Suðuroynni vóru á fundi við P/F Suðuroyartunnilin og Løgmann hin 20. januar 2025-* hevur Tekniska deild tikið tilmælið hjá borgarstjóranum til eftirtektar, um at gagnnýta avlopsgrótið, samsvarandi ynskið hjá P/F Suðuroyartunnilsfelagnum og løgmanni.

Tekniska deild hevur mett um, hvørjar verkætlanir Tvøroyrar kommunu hevur hugsað, at grótið kann gagnnýtast til.

Verkætlanir í uppskotið til tunnilsgrót:
Vegleiðandi nøgdir av gróti eru fylgjandi:
- Byrging inni í dalinum í Trongisvági longd 205m: uml. 41.200 m3
- Útfylling frá Drelnesi og vestureftir: (í mesta lagi) uml. 560.000 m3
- Útfylling frá Drelnesi og til Krambatanga: (í mesta lagi) uml. 607.250 m3

Til samanberingar, var uml. 75.000 m3 grót í rúgvuni frá Hvalbiartunnlinum.

Slíkar verkætlanir skulu góðkennast av friðingarmyndugleikanum og byggivaldinum á staðnum, eins og byggisamtyktin má broytast samsvarandi.

Lógargrundarlag:
- Byggisamtyktin fyri Tvøroyrar kommunu
- Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing
- Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum

Fíggjarligar avleiðingar:
Ókent – tó er greitt, at verjugrót ella spunsprofilar mugu mest sannlíkt útvegast til útfyllingar. Kostnaðurin av verkætlanum fer óivað at kosta eina 2-siffraða milliónaupphædd.


Tilmælið:
Umframt góðkenning av byggivaldinum á staðnum, skal gerð av byrging og útfylling góðkennast av friðingarmyndugleikanum og umhvørvismyndugleikum.

Tekniska deild og kommunustjórin mæla til, at býráðið heimilar borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við ætlanum um gerð av einari byrging til rávatnsgoymslu, umframt útfyllingar á sunnaru síðu av Trongisvágsfirði.

Býráðið 30. januar 2025:
Einmælt samtykt at heimila borgarstjóranum og umsitingini at arbeiða víðari við ætlanum at taka ímóti gróti frá Suðuroyartunlinum til gerð av einari byrging til rávatnsgoymslu, umframt útfyllingar á Trongisvágsfirði. Eisini verður heimila umsitingini at samráðast við eigarar av lendi, friðingarmyndugleikar og umhvørvismyndugleikar at útvega neyðug loyvir hesum viðvíkjandi.

Verkætlanir hjá Tvøroyrar kommunu í uppskotið til tunnilsgrót


- Byrging til drekkivatn inni í dalinum í Trongisvági longd 205m: uml. 41.200 m3



- Útfylling frá Drelnesi og vestureftir: (í mesta lagi) uml. 560.000 m3
- Útfylling frá Drelnesi og til Krambatanga: (í mesta lagi) uml. 607.250 m3



Fylgiskjal_15_Mynd_vid_uppskot_grótlagur_ í_ Sandvík



Niðurstøða

Eins og tunnilsfelagið ger vart við, er Tvøroyrar kommuna samd um, at avlopsgrótið er eitt tilfeingi, sum eigur at verða gagnnýtt. Tvøroyrar kommuna sær møguleika fyri at kunna taka ímóti øllum grótinum frá Suðuroyartunlinum. Tvøroyrar kommuna er opin fyri at arbeiða víðari við verkætlanum, har grótið kann endurnýtast, um hetta hevur áhuga hjá tunnilsfelagnum, og kann blíva ein partur av verkætlanini.

Grundgevingar fyri Suðuroyartunlinum:

1. **Fast samband skapar vøkstur:** Suðuroyartunnilin fer at binda Suðuroynna saman við restina av Føroyum og geva betri atgongd til útbúgvingar, arbeiði og vinnulív.

2. **Støðufesti og trygd:** Ein undirsjóvartunnil er ikki treytaður av veðurlíkindum, men tryggjar álítandi samband alt árið.

3. **Javnbjóðisrættindi:** Tað er eitt týdningarmikið mál fyri rættvísi og landspolitikk at veita øllum økjum somu møguleikar. Suðuroyggin eigur ikki at standa eftir sum einasta stóra oyggin uttan fast samband.

4. **Langsiktaður búskaparligur fyrimunur:** Ein íløga í Suðuroyartunnilin gevur í longdini størri inntøkur til kommunur og land frá skattum, vøkstur í vinnulívinum og sparingar við minkaðum útreiðslum til samferðslu.

5. **Umhvørvisvinningur:** Smyril brúkar nógva olju, og er ikki óhugsandi, at tá ferjusambandið verður avloyst við tunli, minkar útlátið av vakstrarhúsgassum munandi.

Niðurstøða: Suðuroyartunnilin er ikki bert eitt ynski, men er alneyðugur fyri tilveru-grundarlagið í Suðuroynni. Tað snýr seg um at tryggja framtíðina hjá Suðuroynni, styrkja samanhald í føroyska samfelagnum og skapa javnrættindi millum oyggjarnar. Smyril livir ikki longur upp til krøvini um tíðarhóskandi, álítandi og støðuga flutningsleið. Ein tunnil er lykilin til vøkstur og trivnað, ikki bara í Suðuroynni, men fyri allar Føroyar.

Suðuroyingar eru javnan í einari støðu, ið er ótolandi. Higartil í ár eru 16 broytingar í siglingini hjá Smyrli. Í undanfarnum árum hava tað verið fleiri enn 60 broytingar í siglingini um Suðuroyarfjørð orsakað av veðri og tekniskum brekum hjá Smyrli. Tað er flest øllum greitt, at Smyril hevur ein aldur, ið viðførur fleiri brek fyri hvørt ár, sum kemur.

Landið kann ikki annað enn taka neyðug stig til at broyta skeivu gongdina í Suðuroynni ájavnt við tann framburð, sum sæst í miðstaðarøkinum og kringøkinum, har fast samband er til miðstaðarøkið. *-sí niðanfyri stabbamyndir-*

Loysnin er at byrja uppá Suðuroyartunnilin skjótast til ber, og ikki lata verkætlanina seinkast óneyðugt, vegna uppskot um ta einu ella aðru linjuføringina á Sandi.


Tvøroyrar kommuna hevur fult álit á verkætlanini hjá P/F Suðuroyartunnilinum og Løgmanni við fylgibólkum. Mest týdningarmikið fyri okkum er, at byrjað verður uppá tunnilin sum skjótast, soleiðis at suðuroyingar kunnu ferðast javnbjóðis í egnum landi eins og flest allir aðrir føroyingar.

Kristin Michelsen
Borgarstjóri


Fróði Mortensen
Kommunustjóri

Hagtøl fyri fólkatøl og fólkasamanseting:

Fólkatal og fólkasamanseting fyri Tvøroyrar kommunu 1985-2025



Fólkatøl fyri kommunur 2012-2022




TVØROYRAR
KOMMUNA

Kristin Michelsen

Fra: Fróði Mortensen
Sendt: 11. december 2024 11:55
Til: Hans Kári Vang
Cc: Kristin Michelsen
Emne: SV: Tvøroyrar kommuna -Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Kommunufelagið
Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur

Hervið verður boðað frá, at Tvøroyrar býráð hevur á býráðsfundi hin 6. desember 2024 viðgjørdi hoyringarskriv um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Tvøroyrar býráð samtykti einmælt tilmælið hjá borgarstjóranum at taka undir við fyriliggjandi uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnil, og at almenna partafelagið «P/F Suðuroyartunnilin» verður byggiharri fyri alla verkætlanina.

Vinarligar heilsanir

Fróði Mortensen
Kommunustjóri
Mobile +298 781122

frodi@tvoroyri.fo

Tvøroyrar kommuna
Tvøravegur 37 • 800 Tvøroyri • Føroyar
Tel+298611085 • tvoroyri@tvoroyri.fo • www.tvk.fo

Tvøroyrar Kommuna er fevnd av løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum: meira kunning her.
Innihaldið í hesum teldubræv og hjásendum skjølum er bert til innanhýsis nýtslu ella í trúnaði, ella einans vera ætlað nevndum móttakarum. Sjónarmiðini í innihaldinum kunnu vera persónligar ásannir sendarans. Eru tygum ikki rætti móttakari, verður sagt frá, at tað er stórligga bannað at siga frá um innihaldið, at endurskapa, endurprenta, breiða út ella á annan hátt nýta hetta tilfar. Hava tygum mottikið hetta teldubræv, og eru ikki rætti móttakari, verða tygum vinarliga biðin um at siga fra til avsendaran.

Fra: Hans Kári Vang <hanskariv@kf.fo>
Sendt: 15. november 2024 09:48
Til: eidi@eidi.fo; eystur@eystur.fo; fugloy@fugloy.fo; hov@hov.fo; Húsavíkar kommuna <husavik@husavik.fo>; hvalba@hvalba.fo; hvannasund@hvannasund.fo; info@fuglafjordur.fo; info@vidareidi.fo; Journalin Tórshavnar kommuna <torshavn@torshavn.fo>; Klaksvíkar kommuna <klaksvik@klaksvik.fo>; kommunan@famjin.fo; kunoy@kunoy.fo; kvivik@kvivik.fo; nes@nes.fo; porkeri@porkeri.fo; runavik@runavik.fo; sandur@sandur.fo; sjk@sjovarkommuna.fo; skalavik@skalavik.fo; skopun@skopun.fo; skugvoy@skugvoy.fo; sorvag@sorvag.fo; sumba@sumba.fo; sunda@sunda.fo; Tvøroyrar Kommuna <tvoroyri@tvoroyri.fo>; vaga@vaga.fo; vagur@vagur.fo; vestmanna@vestmanna.fo
Cc: Eyðun Christiansen <eydunc@kf.fo>; Janus Haraldsen <janush@kf.fo>; Armgarð Hammer <armgard@kf.fo>; Tórbjørn Jacobsen <tobbi@runavik.fo>
Emne: VS: Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Til allar kommunur

Lógaruppskotið um Suðuroyartunnil er komið til hoyringar.

Uppskotið hevur nógv fylgiskjøl og tey eru ikki send við. Tey finna tit her:

https://www.lms.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/uppskot-til-loegtingslog-um-suduroyartunnilin-vid-tilhoyrandi-tunnilskervum-og-vegakervum

Ummælisfreistin er **6. desember kl. 12.00**

Heilsan

Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur

Kommunufelagið
R.C. Effersøesgøta 30
100 Tórshavn
Tlf.: + 298 787005
Mail: hanskariv@kf.fo
Homepage: www.kf.fo

Fra: Lisa Randi í Dali <Lisa@tinganes.fo>
Sendt: mikudagur, 13. november 2024 15:31
Til: Stovnur kommunufelagið <kf@kf.fo>
Cc: Doris Bjarkhamar <doris.bjarkhamar@tinganes.fo>
Emne: Uppskot til ummælis um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Hesin telduposturin kemur uttanífrá Tórshavnar kommunu.

Til Kommunufelagið

Viðfest er uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Uppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Ummælisfreistin er **6. desember kl. 12.00**

Møguligar viðmerkingar til uppskotið skulu sendast til doris.bjarkhamar@tinganes.fo

Heitt verður á Kommunufelagið um at senda víðari til borgarstjórar og bygdaráðslimir í Suðuroynni og Sandoynni.

Vinarliga / Kind regards

Lisa í Dali
Leiðsluskrivari
Ritara- og stjórnartænasta / Secretariat and Cabinet Affairs
Mobile: +298 21 13 90
lisa@tinganes.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgmansskrivstovan
Prime Minister's Office
Tinganes / FO-110 Tórshavn / The Faroe Islands

BÝRÁÐSSKRIVSTOVAN **TVØROYRAR KOMMUNA**

www.tvoroyri.fo · tvoroyri@tvoroyri.fo · tlf 611085 · postboks 80 · FO 800 Tvøroyri

Løgmansskrivstovan
Att. Aksel V. Johannesen, Løgmaður
Tinganes, Postrúm 64, FO-110 Tórshavn
T-postur: lms@lms.fo

Tvøroyri, hin 14.11.2025
Fróði Mortensen
J.nr. 25/00047

Viðvíkjandi: Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum (fyrireiking, prosjektering og útboð)

Hoyringarsvar frá Tvøroyrar kommunu

Tvøroyrar kommuna vil við hesum staðfesta, at kommunan **heldur fast við tí hoyringarsvari**, sum áður varð innlatið **7. mars 2025**, merkt:
"Fylgiskjal 53 – Hoyringarskriv frá Tvøroyrar kommunu" í sambandi við viðgerðina av máli **LM-072/2024**, *Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum*

Staðfesting av áður innsendum viðmerkingum

Tvøroyrar býráð samtykti einmælt hin 6. desember 2024 at taka undir við uppskotinum til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin og at *almenna partafelagið P/F Suðuroyartunnilin verður byggiharri fyri alla verkætlanina* -(sí Fylgiskjal 53)

Tvøroyrar kommuna hevur ongar viðmerkingar afturat tí fyriliggjandi hoyringarsvari, og ynskir sostatt, at tað áður innsenda hoyringarsvarið verður lagt til grund fyri víðari viðgerð av málinum.

Staðfesting av tilbjóðing um at taka ímóti avlopsgróti

Tvøroyrar kommuna skal harumframt vátta, at kommunan **stendur við tilboðnum um at taka ímóti avlopsgrótinum**, sum áður fráboðað:

- á **hoyringsfundi í fíggjarnevndini 11.04.2024**, og
- í fylgisskjalinum **"F: Suðuroyartunnilin – avlopsgrót"** (Skjal F / LM-072/2024), har greitt verður frá møguleikunum hjá Tvøroyrar kommunu at taka ímóti og gagnnýta grótið sum part av ætlaðum útbyggingar- og íløguverkætlanum.



Hetta fevnir m.a. um:

- møguleikan at taka ímóti *allari grótnøgdinum*, og
- at gagnnýta grótið til verkætlanir í Trongisvági og á Drelnesi, sambært uppskotinum um útbyggingar, útfyllingar og vatnbyrging (sí Skjal F) 072.24 Skjal F Tvøroyrar Kommuna

Tvøroyrar kommuna er framvegis sinna at samstarva við P/F Suðuroyartunnilin og viðkomandi myndugleikar um at menna verkætlanir, har avlopsgrótið verður gagnnýtt á skilagóðan hátt.

Niðurstøða

Tvøroyrar kommuna staðfestir sostatt:

1. at kommunan heldur fast við hoyringarsvarið frá **7. mars 2025 (Fylgiskjal 53)**,
2. at ongar viðmerkingar eru afturat,
3. at kommunan framvegis stendur við tilboðnum at taka ímóti avlopsgróti frá Suðuroyartunlinum.

Viðheft

1. *Fylgiskjal 53 – Hoyringarskriv frá Tvøroyrar kommunu*
2. *Skjal F / LM-072/2024*

Kristin Michelsen
Borgarstjóri

F. Mortensen
Fróði Mortensen
Kommunustjóri